

Vitlíki_Føroya

Heildarætlanin fyri vitlíki 2027-2030

Føroyar skulu vera undangonguland, ið vísir, hvussu ein smátjóð við ábyrgd gagnnýtir vitlíki til at styrkja fólkið, málið og búskapin.

24.11.2026

Formæli_

“Tað er torført at spáa, serliga um framtíðina”, verður skemtandi tikið til. Tað er ongantíð meira aktuelt enn júst í hesum vitlíkistíðum. Vit kunnu tó vera við til at mynda framtíðina við teimum avgerðum, vit taka í dag. Vitlíki fer at ávirka, hvussu vit arbeiða, læra, samskifta og veita tænastur, og tí er tað ein samfelagsuppgáva at tryggja, at tøknin verður brúkt við skynsemi og kemur øllum til góðar. Við hesi heildarætlan seta vit eina felags landsfevnandi kós fyri, hvussu vitlíki skal styrkja fólkið, málið og búskapin.

Vit vilja menna eitt samfelag, sum komandi ættarlið hava hug at búgva og virka í. Har tey kunnu útbúgva seg, finna spennandi størv og byggja sær trygga framtíð. Vitlíki kann stuðla hesum við nýggjum vinnum og fakligum umhvørvum.

Vælferðin hevur givið okkum betri og longri lív. Samstundis verða vit fleiri eldri og lutfalsliga færri í arbeiðsførum aldri. Vit verða tí færri at lyfta eina vaksandi uppgávu á vælferðarøkinum. Vitlíki kann lætta um dagligar uppgávur, so meira orka verður til tað, sum krevur menniskjaligt skil og nærveru.

Innan vinnuna og almenna geiran hava longu verið gjørdar royndir við vitlíki. Arbeiðið við Talgildu Føroyum hevur eisini víst, hvat vit megna, tá ið vit savna førleikar og samstarva um felags mál. Vit eiga at loysa felags uppgávur saman og geva stovnum, kommunum og vinnu stuðul at menna loysnir til sín tørv.

Henda heildarætlan tekur støði í átaki 15 í heildarætlanini fyri Talgildu Føroyar 2025–2027. Har setti landsstýrið sær fyri at lýsa, hvussu samfelagið fær sum mest burtur úr vitlíkistøknini, og hvussu vit verja okkum fyri váðunum.

Heildarætlanin byggir á forkanning, greiningar og royndir úr øðrum londum. Verkstovur og samrøður við áhugapartar tvørtur um samfelagið hava givið innlit í føroyskan tørv og møguleikar.

Gjaldstovan hevur havt ábyrgdina av hesum arbeiði og hevur í samstarvi við ráðgevar hjá VILT! Vitlíkistænastuni staðið fyri at fremja uppgávuna. Vitlíkisstovan luttók eisini í arbeiðinum við forkanningini. Umframt henda faldara er útgreinandi tilfar at lesa um heildarætlanina og øll átøkini á vitliki.fo.

Eg takki øllum, sum hava lagt tíð, vitan og eru komin við hugskotum til arbeiðið. Breiða luttøkan er eitt gott grundarlag at byggja víðari á.

Við hesum handa vit landsstýrismanninum í fíggjarmálum okkara tilmæli til hvørji átøk skulu fremjast fram til 2030. Nú skal ætlanin gerast til veruleika. Tað krevur raðfestingar og samstarv.

Nicolai M. Balle
Deildarstjóri í Talgildu Føroyum

Les meira um heildarætlanina og fá útgreinandi innlit í átøkini her.

Innihaldsyvirlit_

Formæli_ 2

Innihaldsyvirlit_ 4

Inngangur_ 6

Samandráttur_ 10

Bygnaður_ 12

Grundvøllurin_ 14

Átak 1 Vitlíkiseind 18

Átak 2 Vitlíkisleiðreglur 20

Átak 3 Vitlíki í lógarverkinum 22

Átak 4 Altjóða samstarv 24

Átak 5 Tøkniligt undirstøðukervi 26

Átak 6 Dátugrundarlagið 28

Fólkið_ 30

Átak 7 Vitlíkisskúlin 34

Átak 8 Etikkur og rættindi 36

Átak 9 Arbeiðsmarknaðarráð fyri vitlíki 38

Átak 10 Geiraætlanir 40

Málið_ 42

Átak 11 Styrkja føroyska máltøkni 46

Átak 12 Savna máltilfar 48

Búskapurin_ 50

Átak 13 Útbreiðsla í tí almenna 54

Átak 14 Vitlíkin vinna 56

Fíggjarligt yvirlit og viðmerkingar_ 58

Inngangur_

Føroyar skulu vera undangonguland, ið vísir, hvussu ein smátjóð við ábyrgd gagnnýtir vitlíki til at styrkja fólkið, málið og búskapin.

Við hesi visjón seta vit eina felags kós fyri vitlíki í Føroyum. Hon lýsir bæði, hvat vit vilja røkka, og hvussu vit vilja bera okkum at. Vit skulu hava dirvi at gagnnýta møguleikarnar og umhugsni at verja tað, sum hevur týdning fyri okkum.

At vera **undangonguland** merkir, at vit vísa, hvussu vitlíki kann skapa veruligt virði í einum lítlum samfelagi. Vit skulu duga at laga tøknina til okkara tørv og viðurskifti, læra av øðrum og vísa á loysnir, sum onnur eisini kunnu læra av. Tað krevur ikki, at vit eru fyrst við øllum, men at vit ganga undan við nýtslu, sum er væl grundað og gevur úrslit.

Henda stremban hevur eitt ítøkiligt endamál. Føroyar skulu eisini framyvir vera kappingarførar og eitt gott og dragandi stað at liva og virka í. Vinnan skal kunna menna seg og skapa virðisøking. Vit skulu megna at veita tær vælferðartænastur, sum fólkið hevur tørv á og samfelagið væntar. Við vitlíki kunnu vit fáa meira burtur úr okkara tilfeingi og førleikum, lætta um arbeiðið og skapa rúm fyri nýggjum loysnum.

At gagnnýta vitlíki **við ábyrgd** merkir, at vit taka vandarnar í eins stórum álvara og møguleikarnar. Stúranin fyri vitlíki er ein týðandi partur av samrøðuni um okkara framtíð. Tøknin kann gera mistøk, endurgeva fordómar, seta privatlívið undir trýst og gera tað truplari at skilja ímillum álítandi upplýsingar og villleiðing. Hon kann broyta arbeiðslívið og skapa ótryggleika um førleikar, arbeiðspláss og menniskjans leiklut. Hesi atlit skulu hava veruliga ávirkan á tær avgerðir, vit taka.

Vit skulu tí hava greiðar karmar og innlit í, hvussu tøknin verður nýtt, og greiða ábyrgd, tá ið mistøk verða gjørd. Vit skulu varðveita menniskjaliga meting og samband, har tað hevur týdning, og kunna velja vitlíki frá, tá ið nýtslan ikki er ráðilig.

Vit mugu samstundis taka støði í, at tøknin er tøk og longu partur av samfelagnum. Tí er spurningurin ikki longur, um vit skulu brúka vitlíki, men hvussu vit skulu brúka tað. Tað merkir ikki, at vitlíki skal brúkast allastaðni. Ábyrgdin fevnir um at taka tilvitaða støðu til, nær tað tænir okkum, og nær tað ikki ger tað.

At **styrkja** merkir bæði at verja og at menna. Vit skulu verja tað, sum vit byggja samfelagið á, og samstundis menna okkara møguleikar at skapa eina betri framtíð. At verja er eitt nú at varðveita rættindi, álit, mál og mentan. At menna er at geva fólki nýggjar førleikar, gera tænastur betri og skapa nýggjar møguleikar fyri virðisøking.

Visjónin savnar hesa stremban um tær tríggjar súlurnar, **fólkið**, **málið** og **búskapin**.

Fólkið er bæði einstaka menniskjað og felagsskapurin, vit eru partur av. Vitlíki skal styrkja møguleikarnar hjá fólki at læra, arbeiða, luttaka og liva eitt gott lív. Tað krevur, at vit øll fáa møguleika at skilja tøknina og ávirka, hvussu hon verður brúkt, og at ágóðarnir koma breitt út í samfelagið.

Málið er okkara felags samskiftisamboð og ber okkara mentan og samleika. Tí skulu vit bæði verja støðuna hjá føroyskum og menna møguleikarnar at brúka málið á nýggjum økjum. Vit skulu kunna brúka vitlíki á føroyskum.

Búskapurin er grundarlagið undir arbeiðsplássum, virðisøking og felags vælferð. Við vitlíki skulu vit styrkja kappingarførið í vinnuni og førleikan og orkuna í almenna geiranum at veita góðar tænastur. Málið er, at okkara arbeiðsorka, vitan og tilfeingi skapa størri virði og geva okkum betri ráð og rúm til tað samfelagið, vit vilja hava.

Fyri at bera tær tríggjar súlurnar krevst ein felags grundvøllur. Hann fevnir um tær fortreytir, sum skulu vera upp á pláss fyri at røkka visjónini: etiskar meginreglur, hóskandi lógarverk og leiðreglur, trygga nýtslu av dátum, tøkniligt undirstøðukervi og altjóða samstarv. Ein vitlíkiseind skal samskipa felags átøk og hava ábyrgd av at fremja arbeiðið við heildarætlanini.

Skulu vit røkka hesi visjón, er neyðugt við einari **heildarætlan**. Vitlíki kann skapa virði hjá einstøkum fólkum, fyritøkum og stovnum, men skulu vit sum land fáa sum mest burtur úr tøknini, mugu vit seta okkum greið mál og lyfta í felag. Í einum lítlum landi er serliga týdningarmikið, at vit samskipa okkara tilfeingi og byggja víðari á vitan og royndir hjá hvørjum øðrum. Hesa kós setur heildarætlanin.

> *"Vit vilja skapa betri vælferð og ein lættari gerandisdag. Eitt samfelag, har vit fáa hjálp, tá okkum tørvar hana, hava meira tíð til hvønn annan, og har ung hava hug at byggja sær eina framtíð. Tí skulu Føroyar ganga undan í at brúka vitlíki við ábyrgd. Vit seta kósina, so menningin kemur okkum øllum til góðar."*
>
> **Aksel V. Johannesen,**
> landsstýrisfólk í fíggjarmálum

14 átøk grundað á ein grundvøll og tríggjar súlur

Fólkið_

7. Vitlíkisskúlin
8. Etikkur og rættindi
9. Arbeiðsmarknaðarráð fyri vitlíki
10. Geiraætlanir

Málið_

11. Styrkja føroyska máltøkni
12. Savna máltilfar

Búskapurin_

13. Útbreiðsla í tí almenna
14. Vitlíkin vinna

Grundvøllurin_

1. Vitlíkiseind
2. Vitlíkisleiðreglur
3. Vitlíki í lógarverkinum
4. Altjóða samstarv
5. Tøkniligt undirstøðukervi
6. Dátugrundarlagið

Samandráttur_

Heildarætlanin fyri 2027–2030 savnar 14 átøk, sum skulu knýta ráðgeving, førleikamenning og menning av loysnum tættari saman. Stovnar, kommunur og fyritøkur skulu fáa betri stuðul at loysa ítøkiligar uppgávur, og vitan og royndir skulu kunna brúkast tvørtur um fakøki og arbeiðsplass.

Ein nýggj Vitlíkiseind í Talgildu Føroyum verður knýtt at fakligum umhvørvum og teimum, sum skulu brúka loysnirnar. Samstundis verða førleikamenning á Fróðskaparsetrinum og arbeiðið hjá Máltøknideplinum styrkt. Hetta skal skapa samband millum tørvin í gerandisdegnum, læring og tøkniliga menning. Fakmyndugleikar, stovnar og fyritøkur varðveita ábyrgdina av egnum tænastum og avgerðum.

Felags tøkniligar tænastur, dátuatgongd og vegleiðingar skulu stuðla fleiri átøkum í senn. Royndir á arbeiðsplássum skulu vísa, hvar hesar fortreytir vanta, og geva ítøkilig lærudømi til Vitlíkisskúlan. Arbeiðsmarknaðarpartarnir skulu hava ein fastan leiklut í at ávirka broytingarnar, meðan geiraætlanir skulu knýta felags átøk at uppgávunum á skúla- og vælferðarøkjunum.

Á máløkinum skulu innsavning av føroyskum tilfari og menning av málamboðum ganga hond í hond. Tilfarið skal bæði brúkast til menning og til óhefta eftirmeting. Í tí almenna verða royndir savnaðar um útvaldar arbeiðsgongdir, eitt nú vaktarplanlegging og málsviðgerð. Í vinnuni verður dentur lagdur á at hjálpa fyritøkum at velja eina hóskandi uppgávu og næsta stig. Lærdómurin skal nýtast til at menna felags stuðulin og fyrireika breiðari nýtslu. Størri verkætlanir og varandi rakstur krevja serstaka avgerð og fígging.

Nr.	Átak	Endamál
Grundvøllurin_		
1	**Vitlíkiseind**	Tryggja felags kós, samskipan og ráðgeving og fremja heildarætlanina í verki. Verður skipað sum nýggj eind á Gjaldstovuni.
2	**Vitlíkisleiðreglur**	Geva greiða vegleiðing um forsvarliga nýtslu, val av amboðum, upplýsingavernd og eftirkanning.
3	**Vitlíki í lógarverkinum**	Greiðar reglur, ábyrgd og rættindavernd og kanna tørvin á nýggjari lóggávu og tillagingum í verandi lógarverki.
4	**Altjóða samstarv**	Gjøgnum altjóða samstarv geva Føroyum atgongd til at fáa og geva vitan, førleikar, tøkni og tilfeingi.
5	**Tøkniligt undirstøðukervi**	Tryggja álítandi atgongd til rokniorku og tænastur eftir tørvi, trygd, burðardygd og kostnaði, bæði í Føroyum og hjá altjóða samstarvsfeløgum.
6	**Dátugrundarlagið**	Gera tað lættari at finna og fáa lógliga atgongd til og endurnýta álítandi føroyskar dátur.
Fólkið_		
7	**Vitlíkisskúlin**	Menna førleikar, deila vitan og knýta netverk, so fleiri kunnu skilja, brúka og taka støðu til vitlíki. Skúlin verður skipaður á Fróðskaparsetrinum.
8	**Etikkur og rættindi**	Styrkja etiska ráðgeving og rættindavernd við atliti at javnrætti, sjálvsavgerð og kærumøguleikum. Verandi ráð og nevndir skulu førleikamennast.
9	**Arbeiðsmarknaðarráð fyri vitlíki**	Geva arbeiðsmarknaðarpørtunum leiklut í broytingum, førleikamenning og betri nýtslu av arbeiðsmegi. Eitt arbeiðsmarknaðarráð verður sett á stovn.
10	**Geiraætlanir**	Gera fakliga grundaðar ætlanir fyri vitlíki á skúla-, útbúgvingar-, almanna-, heilsu- og eldraøkinum.
Málið_		
11	**Styrkja føroyska máltøkni**	Styrkja førleikar og málamboð, so føroyskt kann brúkast í arbeiði, útbúgving og gerandisdegi. Máltøknidepilin skal styrkjast.
12	**Savna máltilfar**	Savna, góðskutryggja og røkja føroyskt máltilfar til menning og óhefta eftirmeting við greiðum nýtslutreytum.
Búskapurin_		
13	**Útbreiðsla í tí almenna**	Royna vitlíki í almennum arbeiðsgongdum við royndarverkætlanum og máta gagn og kostnað sum grundarlag fyri breiðari nýtslu.
14	**Vitlíkin vinna**	Hjálpa fyritøkum at velja hóskandi stig við vitlíki og styrkja framleidni, nýskapan og kappingarføri.

Bygnaður_

Ætlanin setir felags kós og raðfestir uppgávur, sum krevja samskipan tvørtur um land, kommunur, vinnu og fakumhvørvi. Hon er ikki ein útgreinað menningar- og rakstrarætlan fyri hvørja vitlíkisloysn. Føroyskur tørvur skal stýra valinum av amboðum og samstarvi, og bygt verður á altjóða menning og føroyskar førleikar. Umframt yvirskipaða lýsing av átøkunum er útgreinandi tilfar um heildarætlanina og tey 14 átøkini at finna á vitliki.fo.

Verksetingin krevur meira greiðu á ábyrgd, arbeiðsorku, heimildum og fígging. Ítøkiligar royndir skulu geva grundarlag fyri avgerð um framhald, tillaging ella steðg. Størri verkætlanir, breið útbreiðsla og varandi rakstur krevja serstaka kostnaðarmeting, avgerð og fígging.

Vitlíki í hesari heildarætlanini
Vitlíki er eitt breitt heiti fyri ymisk sløg av tøkni. Henda heildarætlan leggur serliga dent á generativt vitlíki, sum eru teir stóru málmyndlarnir, sum kunnu skapa tekst, myndir, ljóð og annað tilfar. Tað er serliga henda tøknin, sum hevur sett vitlíki á dagsskránna, síðan ChatGPT varð tøkt fyri almenningin í november 2022.

Tó er eingin endalig avmarking til hetta slagið av vitlíki. Rúm er eisini fyri øðrum sløgum, so sum vitlíki til forsagnir og avgerðarstuðul, planlegging og optimering, mál- og talutøkni, mynda- og sensorgreining og nýtslu av tólmennum og vælferðartøkni.

Lesivegleiðing
Henda heildarætlan lýsir yvirskipað hvørja visjón vit sum land hava sett okkum, og hvørji átøk skulu fremjast fyri at røkka visjónini. Umframt henda faldara liggur rúgvsmikið útgreinandi tilfar um hvørt einstakt átak, og heildarætlanina í síni heild, á vitliki.fo. Skjalið er býtt í tveir partar. Fyrri partur gevur innlit í visjónina – Inngangurin – eitt samlað yvirlit yvir átøkini og endamálini – Samandrátturin – umframt hetta brotið - Bygnaður. Seinni partur er vígdur grundvøllinum, teimum trimum súlunum, átøkunum, sum hoyra til teirra, og at enda einum fíggjarligum yvirliti.

Fyri hvørt átak verður eitt endamál lýst, hvat verður gjørt, ábyrgd og samstarv, tíð og máting og fortreytir og váðar. Tilvísingar til onnur átøk vísa, hvar arbeiðið skal samskipast. Har ábyrgdarbýti, tíðir ella málvirði eru fyribils, skulu tey staðfestast í verksetingini. Aftast er fíggjarliga yvirlitið fyri 2027–2030 við fortreytum fyri og avmarkingum av kostnaðarmetingini.

Meginreglur
Meginreglurnar lýsa, hvat eigur at verða galdandi tvørturum øll átøk, tá arbeitt verður at seta hesi í verk.

Átøk skulu hava greið mál áðrenn byrjað, og úrslit skulu kunna mátast aftaná
Øll átøk skulu taka støði í einum ítøkiligum tørvi. Áðrenn byrjað verður, skal vera greitt, hvat skal betrast, hvussu úrslit verða máld, og hvør tekur avgerð um framhaldið. Fakfólk, starvsfólk og brúkarar skulu takast við. Royndir og úrslit skulu deilast, eisini tá ætlaða gagnið ikki verður rokkið. Góðar royndir skulu geva grundarlag fyri víðari menning og breiðari nýtslu.

Ábyrgd og avgerðarheimildir skulu vera greiðar
Fyri hvørt átak skal vera greitt, hvør hevur yvirskipaðu og politisku ábyrgdina, og hvør fremur arbeiðið í verki. Fakliga ábyrgdin av tænastum og avgerðum skal vera staðfest. Tað skal eisini vera greitt, hvør regluliga fylgir upp á úrslit og forðingar og tekur avgerð um framhald, tillaging ella steðg.

Trygd skal vera við frá byrjan
Trygdarváðin við vitlíki er umfatandi og samansettur. Tí eigur trygd at verða hugsað inn í allar vitlíkisloysnir frá fyrireiking, innkeypi, menning og rakstri.

Orku- og tilfeingisnýtsla skulu takast við í avgerðirnar
Tað krevur nógva og stóra útgerð at koyra stórar málmyndlar og tí skulu loysnir metast eftir gagni, orku- og tilfeingisnýtslu og ávirkan á umhvørvið. Metingin skal fevna um bæði menning og dagligan rakstur.

Javnbjóðis atgongd og luttøka skulu vera partur av menningini
Loysnir skulu mennast við atliti at fólki við ymiskum førleikum og tørvi. Tey, sum verða ávirkað, skulu í tann mun tað er møguligt og gagnligt hava møguleika at ávirka menningina. Hyggjast skal eftir, hvør fær gagn av loysnunum, og um tær skapa ójavna ella skeivleikar, eisini millum kvinnur og menn. Fólk, sum ikki kunnu brúka eina vitlíkisloysn, skulu hava atgongd til hjálp ella aðrar hóskandi tænastur.

Grundvøllurin_

Talgilda grundarlagið.

Føroyar hava eitt væl ment talgilt grundarlag at byggja víðari á. Nýtsla av vitlíki setur tó nýggj krøv til trygd, førleikar og ábyrgd. Hesi viðurskifti mugu vera í lagi, skulu vit fáa gagn av tøknini.

Átak 1	Vitlíkiseind	18
Átak 2	Vitlíkisleiðreglur	20
Átak 3	Vitlíki í lógarverkinum	22
Átak 4	Altjóða samstarv	24
Átak 5	Tøkniligt undirstøðukervi	26
Átak 6	Dátugrundarlagið	28



Í forkanningini lýstu luttakarar úr vinnuni og tí almenna stóran áhuga fyri vitlíki, men eisini óvissu um, hvussu tey kundu koma trygt í gongd. Tey sóknaðust eftir ráðgeving, greiðari leiðreglum og hjálp til at loysa felags uppgávur. Hetta er bakgrundin fyri, at heildarætlanin savnar samskipan, reglur, altjóða samstarv, dátur og tøkni í tað, ið verður rópt grundvøllurin.

Vitlíkiseindin

Fyri at samskipa hetta arbeiðið verður ein vitlíkiseind stovnað. Hon skal m.a. orða leiðreglur, standa fyri altjóða samstarvi, tryggja eitt talgilt undirstøðukervi og skipa eitt úrvalslið at standa fyri royndarverkætlanum. Í einum lítlum samfelagi hevur tað stóran týdning, at vit fáa gagn av tí, onnur longu hava lært og bygt upp. Fakligu umhvørvini eru smá, og tað kann vera torført hjá hvørjum einstøkum arbeiðsplássi at hava alla ta serfrøði, sum nýtsla av vitlíki krevur. Nógvir av spurningunum eru teir somu, hóast uppgávurnar eru ymiskar. Við at savna vitan og loysa felags uppgávur saman, kunnu vit gera tað lættari hjá fleiri at koma víðari.

Leiðreglur

Fólk hava eisini tørv á at vita, hvussu tey kunnu brúka vitlíki við ábyrgd. Leiðarar og starvsfólk mugu kunna fáa hjálp at velja amboð, verja dátur og meta um úrslit. Tað skal vera greitt, hvør hevur ábyrgd av at verja dátur og eftirkanna úrslit. Greiðar leiðreglur kunnu geva stuðul í gerandisdegnum, meðan løgfrøðiligar greiningar kunnu greiða ivamál og vísa, hvar tørvur er á broytingum. Hetta arbeiðið má hanga saman, so vitanin verður til vegleiðing, sum fólk kunnu brúka í sínum arbeiði.

Altjóða samstarv og tøkni

Vit kunnu samstundis fáa nógv burtur úr altjóða samstarvi. Tað gevur atgongd til vitan, tøkni og tilfeingi og møguleika at læra av royndum hjá øðrum. Okkara uppgáva er at velja og laga loysnirnar til føroyskan tørv og varðveita og ogna okkum neyðugan førleika at taka støðu til tær.

Vitlíki krevur eisini eitt tøkniligt undirstøðukervi, sum ger tað møguligt at royna og nýta loysnir á tryggan hátt. Vit skulu byggja víðari á verandi skipanir og tryggja atgongd til hóskandi rokniorku, hýsing og dátur bæði í Føroyum og hjá altjóða samstarvsfeløgum. Felags tøkniligar tænastur kunnu lætta um á arbeiðsplássum, so tey ikki hvør sær skulu byggja alt upp frá grundini. Útbyggingin skal taka støði í ítøkiligum tørvi og fylgja teimum royndum, vit gera okkum, við greiðari ábyrgd av trygd, rakstri og kostnaði.

Átøkini undir Grundvøllinum skulu styrkja hesar felags fortreytir og gera tað lættari at nýta vitlíki trygt og við ábyrgd.



Átak 1 Vitlíkiseind

Endamálið er at tryggja felags kós og framdrátt fyri ábyrgdarfullari og virðisskapandi gagnnýtslu av vitlíki í Føroyum, tvørtur um land og kommunur og í tøttum samstarvi við vinnuna.

Hvat verður gjørt

Í forkanningini varð sóknast eftir einum felags stað við ráðgeving og førleikum, so stovnar og fyritøkur ikki skuldu loysa somu spurningar hvør sær. Vitlíkiseindin skal svara hesum tørvi við samskipan og við at hjálpa stovninum at fara í holt við at seta í verk vitlíkisloysnir.

Vitlíkiseindin verður ein nýggj eind á Gjaldstovuni. Hon skal samskipa og dríva heildarætlanina fram, ráðgeva almennum stovnum og kommunum, hava eitt tvørfakligt úrvalslið, sum setir í gongd og leiðir royndarverkætlanir, standa fyri altjóða samstarvi og skipa tað tøkniliga undirstøðukervi.

Eindin skal eisini menna felags amboð, leiðreglur, politikkir og mannagongdir og samskipa lógararbeiði. Hon skal savna royndir og tryggja, at læring verður deild og brúkt tvørtur um geirar.

Vitlíkiseindin setir úrvalsliðið saman eftir tørvinum í hvørjari verkætlan við serfrøðingum úr stovnum, kommunum, Fróðskaparsetri Føroya og vinnuni. Liðið arbeiðir í tíðaravmarkaðum toymum og veitir verkliga hjálp innan tøkni, løgfrøði, dátuvernd, trygd og broytingarleiðslu. Arbeiðið fer fram saman við starvsfólkunum á staðnum, so førleikar verða bygdir upp, meðan stovnurin ella kommunan varðveitir fakligu ábyrgdina.

Eitt landsfevnandi vitlíkisráð verður sett at ráðgeva um strategi og tryggja samstarv tvørtur um geirar. Vitlíkisráðið skal verða mannað av stóru geirunum – kommunur, vinna og land, herundir miðfyrisiting, almannaheilsa og undirvísing. Ráðið, Vitlíkiseindin og Vitlíkisskúlin mynda samstarvsfyriskipanina Vitlíki Føroya.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Fíggjarmálaráðið.

Gjaldstovan er verksetandi eind. Samstarvspartar eru Kommunufelagið, stjórnarráð, Fróðskaparsetur Føroya, Vinnuhúsið og aðrir týðandi áhugapartar.

Tíð og máting

- **2026**: Bygnaður og setanartilgongd verða fyrireikað.
- **2027**: Eindin verður formliga sett á stovn við tveimum starvsfólkum, og virksemið byrjar.
- **2027–2028**: Fimm royndarverkætlanir verða fyrireikaðar og framdar við stuðli í teimum fimm royndarøkjunum undir átaki 13: Útbreiðslu í tí almenna.
- **2028–2030**: Eindin verður fullmannað við fimm starvsfólkum og hevur fult virksemi. Fyrsta árliga frágreiðingin í 2028 vísir støðuna á átøkunum. Í 2029 veitir eindin allar sínar tænastur.

Eindin verður mátað eftir framgongd í heildarætlanini.

Fortreytir og váðar

Heimildir skulu vera greiðar. Eindin byrjar í smáum og skal tí í byrjanini hava atgongd til løgfrøði, dátuvernd, trygd og tøkniliga serfrøði uttanífrá. Arbeiðið skal samvirka við heildarætlanina fyri talgilding av samfelagnum.

> *„Vit hugsa ov nógv um stovnar og kommunur heldur enn prosessir.“*
>
> Leiðari í almennari fyrisiting
> Kelda: Verkstova um munadyggan almennan geira

Átak 2 Vitlíkis-leiðreglur

Endamálið er at orða og seta í verk greiðar leiðreglur um rætta og forsvarliga nýtslu av vitlíki. Tær skulu minka um óvissu, hjálpa við at velja amboð, verja dátur og eftirkanna úrslit, so tøknin skapar virði og stuðlar álítandi tænastum.

Hvat verður gjørt

Á verkstovunum í forkanningini var sjónligt, at óvissan um, hvar og í hvønn mun vitlíki kann nýtast, er stór. Luttakarar søknaðust eftir einfaldum leiðreglum og arbeiðsleistum, sum kundu lagast til teirra arbeiðspláss. Ein vegleiðingarpakki skal gera hesi ivamál lættari at handfara í gerandisdegnum.

Felags vegleiðingarpakkin verður gjørdur við støði í veruligum arbeiðsuppgávum og síðan royndur saman við brúkarunum. Hann skal geva greið svar um góðkenda nýtslu, hvørjar upplýsingar kunnu leggjast í amboðini, og hvør hevur ábyrgd av eftirkanning. Fyrsta útgávan fevnir um:

- Nýtslupolitikk og amboðsgóðkenning við endamáli, ábyrgd og treytum fyri nýggjari meting.
- Dátur og trúnað, dátuflutning og goyming við arbeiðsdømum og atgongd til serfrøði.
- Fakliga og málsliga eftirkanning, keldukanning og menniskjaligt eftirlit.
- Almenn kt-útboð við krøvum til vitlíkisførleikar, royndir, skjalprógv, útveljing, tilboðsmeting og sáttmálar.
- Innleiðing í arbeiðsgongdir við leistum til skjalfesting, kunning og fráboðan av mistøkum.

Bygt verður á vegleiðingar hjá Dátueftirlitinum og meginreglur fyri talgilding. Fakmyndugleikarnir menna serstakt tilfar til skúla- og vælferðarøki sum part av Geiraætlanum (átak 10). Fyribils verður mælt til at byrja við almennum stovnum og síðan taka kommunur og vinnu við. Bindandi virknaður, málbólkar og heimild skulu vera greið undan innleiðing.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Fíggjarmálaráðið.

Vitlíkiseindin (átak 1) ger og røkir tilfarið við fakmyndugleikunum. Átak 3 veitir rættarligar greiningar, Vitlíkisskúlin (átak 7) knýtir læring at leiðreglunum, og Etikkur og rættindi (átak 8) gevur etisk íkast.

Samstarvspartar eru Dátueftirlitið innan sínar uppgávur, Gjaldstovan (økini Talgildu Føroyar, KT landsins, KT-trygd og Keyp landsins), stovnar, kommunur, vinna og starvsfólkaumboð.

> *„Hví er eingin fyribils leiðbeining send til landsins stovnar um nýtslu av vitlíki?“*
>
> Luttakari á tiltakinum í Smæruni 6. mai 2026
> Kelda: Luttaka frá tiltakinum í Smæruni 6. mai 2026

Tíð og máting

- **2027**: Tørvur verður lýstur, og fyrsti vegleiðingarpakkin verður gjørdur og royndur.
- **2028**: Tilfarið verður lagað til og innført breiðari; arbeiðsleistir verða útbygdir.
- **2029–2030**: Reglulig røkt, dagføring og eftirmeting av nýtslu og virknaði.

Mátað verður eftir nýtslu, greiðum svarum, góðkenning og eftirkanning, viðgerðartíð og mistøkum, eisini í kt-útboðum. Árlig frágreiðing vísir úrslit og tørv á dagføring.

Fortreytir og váðar

Faklig og løgfrøðilig góðskutrygging, greiðir eigarar og fígging til bæði fyrstu útgávu og varandi røkt eru neyðug. Óítøkiligt ella ótíðarhóskandi tilfar kann skapa ótrygga ella óneyðuga avmarkaða nýtslu. Tí skulu arbeiðsdømi, útgávudagur og endurskoðanarfreist vera greið.

Átak 3 Vitlíki í lógarverkinum

Endamálið er at samskipa arbeiðið við rættarligu karmarnar fyri menning og nýtslu av vitlíki. Borgarar, stovnar og fyritøkur fáa greiðari at vita um reglur, ábyrgd og rættindavernd, tá tøknin og nýtslan broytast. Greiðar avtalur skulu gerast við rættindahavarar um nýtslu av tilfari og gjald fyri tilfar.

Hvat verður gjørt

Luttakarar í forkanningini lýstu óvissu um reglur og ábyrgd. Rættindahavarar løgdu samstundis dent á kunnleika til upphavsrætt og greiðar avtalur um nýtslu. Hetta gevur grund til at savna løgfrøðiligar greiningar og kanna tørvin á møguligum tillagingum.

Føroyska rættarstøðan verður lýst, tvørgangandi spurningar savnaðir og tørvur á greining og møguligari tillaging eyðmerktur. Reglur um dátuvernd, fyrisiting, innlit, skjalasøvn og trygd eru longu viðkomandi, men spjaddar á fleiri lógarøki og myndugleikar.

Arbeiðið fevnir um gjøgnumskygni, tá vitlíkisgjørt ella broytt tilfar verður almannakunngjørt. Skilt verður millum lógarásett upplýsingarkrøv, ritstjórnarliga ábyrgd og góðan sið. ES-reglur skulu umhugsast, tí tær kunnu raka føroyskar aktørar við ES-sambandi. Upphavsrættur verður viðgjørdur saman við átøkunum um máltøkni (átak 11) og máltilfar (átak 12). Greiðir karmar skulu verja rættindahavarar og gera tað møguligt at nýta tekst, ljóð, myndir og video til gransking, venjing og eftirmeting.

Átakið lýsir rættarliga støðu og samskipar greiningar; Vitlíkisleiðreglur (átak 2) geva verkliga vegleiðing. Støða eigur at verða tikin til eina føroyska vitlíkislóg og lógarbroytingar í verandi lógarverki.

Ábyrgd og samstarv

Tað er enn ikki avgjørt, hvat stjórnarráð skal hava ábyrgdina av átakinum, ella hvør skal verkseta tað. Arbeiðið skal skipast í samstarvi við viðkomandi lógar-ábyrgdarar og fakmyndugleikar. Vitlíkiseindin (átak 1) savnar tvørgangandi spurningar og samskipar uppfylging við átøk 2, 11 og 12.

Samstarvspartar eru Dátueftirlitið, Gjaldstovan (Keyp landsins og KT landsins), aðrir fakmyndugleikar, kommunur, vinna, granskingarumhvørvi, miðlar, skapandi vinnur og rættindahavarar. Viðkomandi myndugleikar varðveita sínar lógar- og eftirlitsheimildir.

> *„Ein kann gott taka reglur úr gildi skjótt, men ein kann eisini bara broyta ferðslureglurnar, so ein kann koyra skjótari. So kemur ein skjótari fram, men vandin fyri óhappi er størri.“*
>
> Luttakari á verkstovu um munadyggan almennan geira
> Kelda: Verkstova um munadyggan almennan geira

Tíð og máting

- **2027**: Rættarstøða og tørvur á greining verða kortløgd, spurningar raðfestir, og arbeiðsbýti avtalað. Neyðugar greiningar til fyrstu leiðreglur og royndir skulu vera tøkar, áðrenn nýtslan byrjar. Avtalur verða gjørdar við rættindahavarar so skjótt sum til ber.
- **2028**: Raðfestir spurningar verða viðgjørdir, og greiningar gjørdar tøkar fyri leiðreglur og máltøkni. Møguligar tillagingar verða viðgjørdar hjá lógarábyrgdarunum.
- **2029–2030**: Karmar og uppfylging verða eftirmett og dagførd eftir royndum og altjóða menning.

Mátað verður eftir skjalfestum avkláringum, viðgerðartíð, óloystum forðingum og nýtslu av niðurstøðunum í verki. Árlig frágreiðing vísir úrslit og næstu raðfestingar.

Fortreytir og váðar

Løgfrøðiligir førleikar og luttøka frá ábyrgdarunum eru neyðug. Ógreitt málsræði og ósamsvarandi tulkingar skapa óvissu; óneyðugar reglur kunnu tyngja menning.

Átak 4 Altjóða samstarv

Endamálið er at tryggja Føroyum virknan lut í altjóða samstarvi um vitlíki. Samstarvið skal geva atgongd til vitan, førleikar, máltøkni, dátutilfeingi, rokniorku og felags loysnir, sum vit ikki kunnu menna einsamøll.

Hvat verður gjørt

Samrøðurnar við partar í grannalondunum hava givið íblástur til føroysku tilgongdina. Altjóða netverk, verkætlanir og undirstøðukervi verða raðfest eftir føroyskum tørvi. Dentur verður lagdur á at styrkja føroyskt mál, geva atgongd til rokniorku og serfrøði og stuðla nýtslu í almennum tænastum og vinnu. Samstarvið skal eisini knýta føroyskar fyritøkur, granskarar og myndugleikar at verkætlanum og fígging og tryggja umboðan av føroyskum áhugamálum.

Møguleikar í eitt nú New Nordics AI, norðurlendskum og baltiskum máltøknetverkum og vitlíkisarbeiðinum í Norðurlandaráðnum verða kannaðir. Luttøka verður mett eftir gagni og treytum.

Atgongd til vitlíkisverksmiðjur og EuroHPC-samstarv verður kannað saman við tøkniligum undirstøðukervi (átak 5). Føroysk hýsing og altjóða tænastur verða samanbornar eftir dátutreytum, trygd, rakstri og samlaðum kostnaði.

Føroyar skulu kunna bjóða seg fram sum royndarland og samstarvsfelagi, eitt nú í fyrisiting, heilsu, útbúgving, fiskivinnu, alivinnu og máltøkni. Samstarvið skal byggja á førleikar í Føroyum og geva royndir, sum fleiri kunnu nýta.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Fíggjarmálaráðið.

Gjaldstovan við Vitlíkiseindini (átak 1) verksetir og samskipar við átak 5, máltøkni (átak 11), máltilfar (átak 12) og nýtslu- og førleikaátøk.

Samstarvspartar eru viðkomandi uttanríkismyndugleikar, Fróðskaparsetur Føroya við Máltøknideplinum, Gjaldstovan (Talgildu Føroyar og KT landsins), fyritøkur, stovnar og kommunur og norðurlendsk og evropeisk netverk, granskingarumhvørvi og veitarar. Ábyrgdarbýti, luttøka og avtalur skulu staðfestast við partarnar.

Tíð og máting

- **2027**: Samstarvsmøguleikar og føroyskur tørvur verða lýst og raðfest. Luttøkutreytir verða kannaðar, og fyrstu avmarkaðu samstørvini avtalað.
- **2028**: Raðfest samstørv verða sett í verk og knýtt at føroyskum verkætlanum. Royndir verða savnaðar, og samstarvið lagað.
- **2029–2030**: Samstarvið verður fastur partur av arbeiðinum; avtalur og luttøka verða eftirmettar eftir staðfestum gagni.

Mátað verður eftir atgongd til vitan og tilfeingi, veruligari nýtslu, førleikamenning og úrslitum, sum kunnu endurnýtast í Føroyum. Fundir og avtalur eru ikki einsamøll mát fyri gagni. Málvirði verða sett fyri raðfest samstørv eftir kortleggingina í 2027. Árlig frágreiðing vísir úrslit og forðingar.

Fortreytir og váðar

Hvørt samstarv krevur føroyskan ábyrgdara, arbeiðsorku og greiðar treytir um dátur, trúnað, rættindi, trygd, rakstur og møguleika at flyta loysnir ella enda samstarvið. Váðar eru luttøka uttan gagn og ov stór veitarabinding. Altjóða rokniorka tryggjar ikki sjálvvirkandi varandi rakstur; kostnaður, burðardygd og føroyskur tørvur skulu metast saman við átaki 5.

> *„Saman kunnu norðurlendsku og baltisku londini røkka tí, sum einki av okkum megnar einsamalt. Við felags íløgum, felags loysnum og tættari samstarvi styrkja vit bæði okkara kappingarføri og mótstøðuføri, samstundis sum vit nærkast málinum um at verða heimsins mest talgilt samanknýtta øki í 2030."*
>
> Fíggjarmálaráðharrin
> Kelda: Norðurlendska ráðharraráðið

Átak 5 Tøkniligt undirstøðu-kervi

Endamálið er at tryggja stovnum, gransking og vinnu álítandi atgongd til rokniorku og tænastur til vitlíkisloysnir. Hýsing í Føroyum, altjóða stórteldur (super computers) og skýtænastur skulu sameinast eftir tørvi, kostnaði, trygd, burðardygd og neyðugum ræði á dátum og kritiskum arbeiðsgongdum.

Hvat verður gjørt

Í forkanningini var ein verkstova um tøkniligt undirstøðukervi. Hon vísti greitt, at rokniorkan í Føroyum til vitlíkisloysnir er sera avmarkað. Umframt rokniorku, so er eisini tørvur á ráðgeving um, hvat er neyðugt at hýsa í Føroyum, og hvat kann hýsast í skýnum. Sum partur av átakinum verður samlaði tørvurin kortlagdur. Felags krøv verða gjørd til fýra veitingarleiðir:

- Egin ella serstakliga tillutað útgerð, hýst lokalt ella hjá veitara, til tætt samband við fakskipanir.
- Hýsing í Føroyum, tá atlit til trygd, viðkvæmar dátur og kritiskar tænastur telja mest.
- Altjóða skýtænastur til menning, venjing og rakstur, tá treytir og kostnaður hóska.
- Altjóða superteldur til krevjandi venjing, neyvstýring og gransking (átak 4, altjóða samstarv).

Veitingin skal fevna um rokniorku, goymslu, net, trygg sambond, atgongdarstýring, eftirlit og rakstrarstuðul. Fyri útvaldar kritiskar tænastur verða avmarkað uttanlandssamband, endurreisn og flyting roynd.

Venjing av grundmyndlum og neyvstillan kunnu fara fram uttanlands, og myndilin kann síðan flytast heim til nýtslu. Átakið fevnir ikki um føroyska rokniorku til at grundvenja stórar málmyndlar frá botni.

Gjaldstovan (KT landsins) skal bjóða vitlíkistænastur eftir sama leisti sum tænastur á Landsneti. Tað er avgerandi, at íløgur í útgerð og ein felags føroyskan pall verða gjørdar skjótast gjørligt.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Fíggjarmálaráðið.

Gjaldstovan (KT landsins) verksetir. Vitlíkiseindin (átak 1) samskipar við KT landsins og átak 4 og við málátøkini 11 og 12 og Útbreiðslu í tí almenna (átak 13). Samstarvspartar eru føroyskir og altjóða veitarar, stovnar, kommunur, vinna, Fróðskaparsetur Føroya og aðrir granskingar-, rakstrar- og trygdarpartar.

Tíð og máting

- **2026**: Fyrstu royndirnar fyri hýsing av vitlíkisloysnum í Føroyum og í skýnum eru lýstar.
- **2027**: Vitlíkistænasturnar verða settar í rakstur við føroyskari hýsing og altjóða rokniorku eftir tørvi. Felags føroyskur pallur verður tøkur. Kortlegging, innkeyp og fyrireiking fara fram samtíðis.
- **2028**: Veitingin verður víðkað til fleiri stovnar og tænastur. Føroysk og altjóða rokniorka verður samskipað eftir tørvi, kostnaði og trygd.
- **2029–2030**: Undirstøðukervi og avtalur verða ment og lagað eftir nýtslu, tøkniligari menning og mátaðum úrslitum.

Mátað verður eftir atgongd til undirstøðukervi, dygd, svartíð, kostnað, kapasitets- og orkunýtslu.

Fortreytir og váðar

Greiðar dátutreytir, rakstrarførleikar og varandi fígging eru neyðug. Vaksandi orkutørvur skal samskipast við grøna orkuskiftið. Høvuðsváðar eru ov stór kapasitetbinding, veitarabinding, sundurbýttar íløgur og veik tilbúgving. Staðbundin útgerð tryggjar ikki einsamøll trygd ella sjálvræði; íløgur skulu byggja á royndir og heildarmeting av kostnaði, umhvørvisárinum og virði.

> *„Vitlíki kann gerast samfelagskritiskt.“*
>
> Luttakari á verkstovu um tøkniligt undirstøðukervi
> Kelda: Verkstova um tøkniligt undirstøðukervi

Átak 6 Dátugrundarlag

Endamálið er at gera tað lættari hjá stovnum, kommunum, granskarum og vinnu at finna og fáa lógliga atgongd til álítandi føroyskar dátur.

Hvat verður gjørt

Á vinnuverkstovuni varð lýst, at atgongdin til almennar dátur kennist læst, og at yvirlit yvir dátur og eigarar vantar. Hetta varð lýst sum ein forðing fyri gransking og nýskapan. Átakið skal gera tað lættari at finna dáturnar, greina treytirnar og loysa ítøkiligar forðingar.

Gjørd verður ein felags dátuskrá, sum vísir innihald, eigara, navngivnan dáturøktara, dagføring og atgongd. Dátur verða sum meginregla røktar hjá kelduni; skráin savnar lýsingar og vísir til dátur og tænastur. Góðskukrøv verða avtalað fyri ætlaðu nýtsluna, og feilir rættaðir við kelduna. Felags hugtøk, eyðkenni, maskinlesilig snið og skjalfest markamót skulu lætta um endurnýtslu.

Opið tilfar verður gjørt tøkt við greiðum treytum. Tilfar við avmarkaðari atgongd fær felags mannagongdir fyri umbønir, avgerðir og avtalur. Heimild, endamál, trúnaður og dátuvernd skulu greinast fyri hvørja nýtslu. Heldin og onnur hóskandi verandi markamót verða nýtt; viðkvæmar dátur krevja atgongdarstýring og vart viðgerðarumhvørvi.

Arbeiðið verður knýtt at verandi grundardátum og Talgildu Føroyum og samskipað við tøkniligt undirstøðukervi (átak 5), lógararbeiði (átak 3) og leiðreglur (átak 2). Máltilfar hoyrir undir Savna máltilfar (átak 12). Felags dátukrøv skulu við í nýggjar skipanir og innkeyp.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Fíggjarmálaráðið.

Gjaldstovan verksetir saman við dátueigarunum, sum varðveita ábyrgd av dátum, góðsku og atgongdaravgerðum. Vitlíkiseindin (átak 1) samskipar tørv og uppfylging.

Samstarvspartar eru virkir, stovnar og kommunur, ið kunnu veita og skulu brúka dátur.

> *"Fleiri í almenna og privata geiranum liggja inni við stórum dátumongdum. Tað ræður um at fáa tær í nýtslu"*
>
> Luttakari á vinnuverkstovu um vitlíki
> Kelda: Samandráttur frá vinnuverkstovuni

Tíð og máting

- **2027**: Ábyrgd og arbeiðsorka verða staðfestar. Fyrsta dátuskráin verður gjørd tøk við 10–15 raðfestum dátusøvnum hjá 3–5 stovnum ella kommunum.
- **2028**: Dátur úr 3–5 raðfestum søvnum ella dátutænastum verða nýttar í verkætlanum. Feilir og manglar, sum forða nýtsluni, verða rættaðir, og atgongdarleisturin verður eftirmettur.
- **2029–2030**: Dátuskráin og tænasturnar verða víðkaðar eftir staðfestum gagni, og dáturøkt verður partur av vanliga rakstrinum.

Mátað verður eftir dátugóðsku, endurnýtslu og tíð til at fáa atgongd og fyrireika dáturnar til nýtslu. Árlig frágreiðing vísir úrslit og forðingar.

Fortreytir og váðar

Fígging og verkætlanarkostnaður skulu staðfestast. Vantandi tíð, ógreiðar heimildir og ov stórt vav kunnu tarna arbeiðinum. Heimild til eina nýtslu gevur ikki sjálvvirkandi heimild til aðra nýtslu ella myndlavenjing.

Fólkið_

Vitlíki skal styrkja fólkið gjøgnum alt lívið. Fólk skulu hava førleikar, atgongd og tryggleika til at gagnnýta tøknina. Vitlíki skal kunna betra læring, arbeiðslív, vælferð og tænastur uttan at menniskjalig ábyrgd, faklig meting, sjálvstøðug hugsan ella sambandið millum fólk gerst veikari.

Átak 7	Vitlíkisskúlin	34
Átak 8	Etikkur og rættindi	36
Átak 9	Arbeiðsmarknaðarráð fyri vitlíki	38
Átak 10	Geiraætlanir	40



Læring og undirvísing
Børn, ung og vaksin skulu bæði duga at brúka vitlíki og at hugsa sjálvstøðugt og kritiskt uttan tøknina. Vitlíki broytir treytirnar fyri undirvísing, læring, prógvtøku og meting og ávirkar leiklutin hjá læraranum. Heildarætlanin leggur eina felags kós, og Undirvísingarstýrið, Fróðskaparsetur Føroya og aðrir fakmyndugleikar gera neyvari ætlanir og taka fakligar avgerðir.

Arbeiðslív, førleikar og skifti
Vitlíki fer væntandi at broyta uppgávur og arbeiðshættir meira enn at beina fyri arbeiði sum heild. Í Føroyum kann tøknin leysgeva tíð til øki við troti á arbeiðsmegi og til uppgávur, sum krevja nærveru, fakligt skil og menniskjaliga meting.

Hetta krevur breiða og varandi førleikamenning og samstarv millum arbeiðsmarknaðarpartar, arbeiðsgevarar, útbúgvingarskipan og myndugleikar. At minka um starvsfólkaorkuna eigur ikki at vera sjálvstøðugt strategiskt mál; endamálið eigur at vera betri nýtsla av arbeiðsmegi, hægri góðska og størri samfelagsvirði.

Almanna-, heilsu- og eldraøkið
Vitlíki kann stuðla fakfólkum, minka um umsiting og geva meira tíð til borgarar, sjúklingar og umsorgan. Økini eru samstundis viðkvom og krevja sterka dátuvernd, greiða fakliga ábyrgd, trygd, frágreiðing, rættindi og menniskjaliga nærveru.

Heildarætlanin setir kós og krevur neyvari ætlanir frá útvaldum geirum. Almannaverkið, Heilsuverkið, Undirvísingarverkið, kommununar og viðkomandi fakmyndugleikar mugu sjálv lýsa tørv, mørk, raðfestingar fyri góðkenning.

Etikkur, rættindi og fólkaræði
Etikkur eigur at síggjast aftur í øllum arbeiðsháttinum og ikki bert sum ein eftirkanning. Tað skal vera greitt:

- hvør verður hoyrdur
- hvør hevur ábyrgd
- hvussu ávirkan verður mett
- hvussu fólk fáa innlit og kæruatgongd
- nær menniskjalig avgerð skal varðveitast.

Etiska ráðið, Dáturáðið og onnur viðkomandi ráð og nevndir eiga at fáa vitan og karmar til at viðgera vitlíki innan síni ábyrgdarøki.

Føroyar skulu nýta vitlíki til at styrkja menniskjaligar førleikar, læring, arbeiði og vælferð. Landsfevnandi heildarætlanin skal seta felags mál, etiskar fortreytir og krøv um uppfylging. Fakmyndugleikarnir skulu gera neyvar ætlanir fyri geirar og taka avgerðir á sínum økjum. Vitlíki skal vera eitt amboð hjá fólki og fakfólkum. Tað skal ikki vera ein ógreið avgerðarskipan, sum flytur ábyrgdina burtur frá menniskjum.

Átak 7 Vitlíkisskúlin

Endamálið er at skipa førleikamenning, vitanardeiling og netverk, so fleiri kunnu skilja, brúka og taka støðu til vitlíki. Skúlin skal vera felags læru- og vitanarpallur fyri fólk við ymiskum tørvum, bæði á arbeiðsmarknaðinum og uttanfyri arbeiðsmarknaðin.

Hvat verður gjørt

Á verkstovuni um fatan og førleikar varð dentur lagdur á at skilja tøknina og varðveita sjálvstøðuga hugsan. Luttakarar vístu á, at fólk hava ymiskar fortreytir at læra. Tí skal skúlin bjóða fleiri inngongdir til læring og knýta hana at veruligum uppgávum. Arbeiðið verður savnað í trimum sporum:

- **Førleikamenning**: Grundskeið og serskeið um fatan, nýtslu, etikk, dátuvernd, kt-trygd, fakliga ábyrgd og kritiska hugsan, knýtt at veruligum uppgávum.
- **Vitanardeiling**: Tiltøk, sýnisgluggar, framløgur og lærudømi, sum miðla bæði góð úrslit og tað, sum ikki riggaði.
- **Netverk**: Føroysk fakfólk og eldsálir ("Vitar") knýta vitlíkisskúlan at arbeiðsplássum, útbúgvingarstovnum, feløgum og fakumhvørvum og gera tørvin á læring sjónligan.

Tilboðini skulu vera atkomulig óansæð útbúgving, talgildar førleikar og bústað. Føroyskt skal vera natúrligur partur av undirvísing og tilfari. Luttakarar skulu læra at velja amboð, eftirkanna úrslit og meta um tørvin á fakligari hjálp. Royndir verða samskipaðar við Útbreiðslu í tí almenna (átak 13); lærudømi eru ikki royndarverkætlanir afturat teimum raðfestu.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Mentamálaráðið.

Fróðskaparsetur Føroya er verksetandi eind. Vitlíkiseindin (átak 1) samskipar tørv og royndir. Skúlin knýtir læring at leiðreglum (átak 2), málamboðum og veruligari nýtslu. Samstarvspartar eru Vinnuhúsið, stovnar, kommunur, útbúgvingarstovnar, arbeiðsmarknaðarpartar, feløg, fakumhvørvi, Vitar og altjóða partar. Ábyrgdarbýtið er fyribils; faklig ábyrgd verður hjá tænastueigarunum.

Tíð og máting

- **2026**: Fyrireikingarbólkur, skipan og skeiðsskrá verða fyrireikað og fyrstu Vitar tilnevndir.
- **2027**: Reglulig skeið, sýnisgluggar, netverk og verkstovur byrja.
- **2028**: Skúlin verður festur sum landsfevnandi pallur við árligari skrá og uppfylging.
- **2029–2030**: Tilboð og netverk verða lagað eftir tørvi, læring og skjalfestari nýtslu.

Minst 30 Vitar innan árslok 2027. Innan árslok 2028 skulu minst 500 starvsfólk og 100 leiðarar hava fingið undirvísing. Átta sýnisgluggar, átta netframløgur, átta verkstovur fyri Vitar, tvær ráðstevnur og tvey nýskapanartiltøk (hackathons). Minst tríggjar samstarvsverkætlanir skulu vera knýttar at skúlanum ella nýttar sum lærudømi.

Máting og uppfylging skulu vísa fatan, eftirkanningarførleika og veruliga nýtslu eftir skeið. Luttøka einsamøll er ikki mát fyri úrslit. Málviðri verða sett fyri tilboðini, og árlig frágreiðing vísir læring, nýtslu og næstu raðfestingar.

Fortreytir og váðar

Varandi arbeiðsorka, undirvísingarførleikar, hóskandi amboð og tíð at læra eru neyðug. Tilfar skal dagførast og virða trúnað og rættindi. Ójøvn atgongd, veitarabinding og ov stórt álit á vitlíki skulu mótvirkast við kritiskari meting og uppfylging í verki.

> *„Ikki gloyma, at vitlíki gevur okkum ein øgiligan møguleika at læra. Tann møguleikan mugu vit royna at gagnnýta.“*
>
> Luttakari á verkstovu um fatan og førleikar
> Kelda: Verkstova um fatan og førleikar

Átak 8
Etikkur og rættindi

Endamálið er at styrkja myndugleikar, ráð og nevndir í at viðgera etiskar og rættindaligar spurningar um vitlíki. Nýtslan skal virða menniskju, javnrætt og sjálvsavgerðarrætt og hava greiðar leiðir til ráðgeving og kæru.

> *„Tá ið dátur og algoritmur ávirka lánsveiting, starvssetan ella atgongd til tænastur og møguleikar, er neyðugt, at fólk kunnu skilja avgerðirnar og mótmæla teimum, og at eftirlit er við teimum, so at fólk ikki verða mett bara út frá tí, sum dáturnar siga um tey. […] Hesi atlit forða ikki fyri nýskapan. Tey gera hana siðaða og menniskjaliga.“*
>
> Leo XIV pávi
> Kelda: Magnifica Humanitas § 164 (føroysk týðing)

Hvat verður gjørt

Á verkstovu um etikk og vitlíki varð stúrt fyri, at minnilutabólkar eru illa umboðaðir í dátum, og at menniskjan kann verða gloymd í tøkniligu menningini. Luttakarar løgdu dent á at hoyra tey, sum verða ávirkað. Etisk meting og brúkaraluttøka skulu gera hetta til part av arbeiðinum frá byrjan.

Tí skulu verandi uppgávur, førleikar og ráðgevandi eindir verða lýstar fyri at vísa, hvør viðger hvørji mál, hvar serfrøði vantar, og hvørjir tvørgangandi spurningar falla uttan fyri. Síðani verður raðfest:

- Førleikamenning um vitlíki, dygd, skeivleikar, rættindi og menniskjaligt eftirlit.
- Ein felags leistur til etiska meting av endamáli, ávirkaðum bólkum, javnrætti, sjálvsavgerð og møguleikum at mótmæla og fáa mistøk rættað.
- Greið leið frá ivamáli til fakliga viðgerð, tilmæli og avgerð hjá rætta ábyrgdaranum.
- Luttøka hjá borgarum og brúkarum og deiling av lærdómi, har trúnaður og rættindi loyva tí.

Etiska metingin skal kanna, um gagnið rættvísger váðar og inntriv í rættindi, og um endamálið kann røkkast við minni inntrivum. Hon skal koma inn, áðrenn týðandi val eru læst.

Bygt verður á verandi eindir og heimildir. Luttøka hjá eitt nú Etiska ráðnum, Vísindasiðseminevndini, Fjølmiðlanevndini og Javnstøðunevndini skal avtalast. Tørvur á nýggjari ella víðkaðari skipan verður ikki mettur, fyrr enn gloppini eru lýst. Lógarspurningar verða knýttir at átaki 3 og lærdómur at leiðreglum (átak 2) og geiraætlanum (átak 10).

Ábyrgd og samstarv

Avvarðandi stjórnarráð fyri nevndu ráð og nevndir hava yvirskipaða ábyrgd. Myndugleikar, ráð og nevndir verkseta innan sínar uppgávur. Vitlíkiseindin (átak 1) samskipar, og Vitlíkisskúlin (átak 7) stuðlar førleikamenning.

Samstarvspartar eru Dátueftirlitið innan sínar uppgávur, fakmyndugleikar, brúkarafeløg, borgarar og arbeiðsmarknaðarpartar. Arbeiðsbýti og luttøka eru fyribils. Verkætlanarábyrgdarin varðveitir ábyrgd av egnari nýtslu.

Tíð og máting

- **2027**: Uppgávur og tørvur verða lýst. Skeið, ráðgevandi leiðir og metingarleistur verða fyrireikað og roynd.
- **2028**: Leistur og samstarv verða útbygd.
- **2029–2030**: Varandi arbeiðsorka og ráðgeving verða skipað eftir tørvi og eftirmett við borgarum og brúkarum.

Mátað verður eftir tøkari og rættstundis ráðgeving, ítøkiligum tillagingum og royndum hjá ávirkaðum bólkum. Árlig frágreiðing vísir úrslit og glopp.

Fortreytir og váðar

Uppgávur, arbeiðsorka og fígging til serfrøði og brúkaraluttøku skulu avtalast. Sjálvræði hjá ráðum og eftirlitsmyndugleikum skal tryggjast. Ógreið ábyrgd og ov sein ráðgeving kunnu gera rættindaverndina veikari. Avgerðaábyrgd og kæruleiðir skulu tí vera greið.

Átak 9 Arbeiðs-marknaðarráð fyri vitlíki

Endamálið er at geva arbeiðs-marknaðarpartunum virknan leiklut í heildarætlanini, so vitlíki stuðlar góðum størvum, førleika-menning og betri nýtslu av arbeiðs-megi. Ábyrgd og heimildir skulu fylgjast, tá uppgávur og arbeiðs-hættir broytast.

> *„Hetta krevur eitt veruligt trípartasamstarv millum politikarar, arbeiðsgevarar og fakfeløg. Tað er ein fortreyt fyri, at vitlíki verður brúkt á ein hátt, sum bæði mennir arbeiðið og tryggjar góðar almennar tænastur.“*
>
> Starvsfelagið
> Kelda: Áheitan hjá Starvsfelagnum

Hvat verður gjørt

Á verkstovu um fatan og førleikar varð víst á tørv á lívlangari læring og samstarvi millum vinnu, fakfeløg og tað almenna. Tilmælið um eitt arbeiðsmarknaðarráð er ein leið at geva hesum pørtum fastan leiklut í at lýsa tørv og ávirka broytingarnar í arbeiðslívinum.

Mælt verður til eitt arbeiðsmarknaðarráð við fakfeløg-um, arbeiðsgevarum á almenna og privata arbeiðs-marknaðinum og myndugleikum. Tað skal vera fastur hoyrings- og samstarvspartur og koma við tíðliga, meðan til ber at ávirka raðfesting, leiðreglur og verkseting.

Ráðið skal viðgera førleikamenning, arbeiðsumhvørvi, ábyrgd, heimildir, persónsvernd, etikk og javnbjóðis atgongd til amboð og læring. Tað fevnir um tíð til eftir-útbúgving, fakliga eftirkanning, starvsfólkadátur og innlit í grundarlagið undir vitlíkisúrslitum. Starvsfólk skulu kunna vísa á mistøk og vita, hvør kann steðga ella broyta eina tilgongd.

Ráðið skal kunna taka mál upp av egnum ávum, mæla til kortlegging og fylgja við royndum. Tilmæli skulu fáa grundgivið svar frá ábyrgdaranum og geva íkast til Vitlíkisskúlan (átak 7), leiðreglur (átak 2), geiraætlanir (átak 10) og royndir. Leikluturin er ráðgevandi og samskapandi. Ráðið yvirtekur ikki leiðsluábyrgd, sáttmálaheimildir ella avgerðar- og eftirlitsheimildir. Útbúgvingarstovnar og Vitlíkisskúlin menna skeið og umskúling; arbeiðspláss og fakmyndugleikar eiga verksetingina.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Vinnumálaráðið. Arbeiðsmarknaðarráðið fer í gongd, tá tað er sett við staðfestari heimild. Mælt verður til sekretariatsstuðul frá Vitlíkiseindini (átak 1), sum samskipar við hini átøkini um lógararbeiði (átak 3) og Etikk og rættindi (átak 8).

Samstarvspartar eru Fakfelagssamstarvið, Føroya Arbeiðarafelag og onnur fakfeløg, Føroya Arbeiðs-gevarafelag, partar í Vinnuhúsinum, Lønardeildin og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Útbúgvingarstovnar og serfrøðingar verða tiknir við eftir tørvi. Umboðan, tilnevning, uppgávur og samband við avgerðartakarar skulu avtalast; arbeiðsbýtið er fyribils.

Tíð og máting

- **2026**: Heimild, umboðan, ábyrgd og arbeiðsorka verða avgreidd, og ráðið fyrireikað og sett. Fyrsta skráin raðfestir førleikar, starvsfólkaluttøku og persónsvernd; hoyring og uppfylging verða avtalaðar.
- **2027**: Samstarvið verður knýtt at átøkum og royndum. Fyrsta árið verður eftirmett.
- **2028–2030**: Ráðið fylgir upp á tilmæli og broytingar í arbeiðslívinum og gevur íkast til nýggjar raðfestingar.

Mátað verður eftir stundvísari luttøku, grundgivnum svarum og ítøkiligum broytingum. Fylgt verður við førleikum, arbeiðsumhvørvi, uppgávum og nýsetanum. Mál verða sett í fyrstu arbeiðsskránni, og úrslit lýst árliga; fundartal einsamalt er ikki mát fyri ávirkan.

Fortreytir og váðar

Breið umboðan, tíð, arbeiðsorka og fígging til sekretariat og serfrøði eru neyðug. Ov sein hoyring, ógreiðar heimildir og samanblanding av ráðgeving og avgerðum eru váðar. Trúnaður og dátuvernd skulu virðast. Heimild, manning, fígging og tíðarstig skulu staðfestast undan byrjan.

Átak 10 Geiraætlanir

Endamálið er at tryggja fakliga grundaðar vitlíkisætlanir fyri skúla- og útbúgvingarøkið og almanna-, heilsu- og eldraøkið. Ætlanirnar skulu vísa møguleikar og fortreytir fyri at styrkja læring, vælferð og tænastur við felags kós og greiðari fakligari ábyrgd.

Hvat verður gjørt

Á fleiri verkstovum komu broytti læraraleikluturin og møguleikar og ivamál í umsorganini fram. Geiraætlanirnar skulu geva fakøkjunum rúm at viðgera hesi íkast við støði í egnum uppgávum.

Hvørt raðfest fakøki fyrireikar eina ætlan við støði í egnum uppgávum og tørvi. Arbeiðstoymi við leiðslu, fakfólki, starvsfólkum og brúkarum fáa stuðul innan tøkni, dátuvernd og trygd. Bygt verður á verandi royndir og ætlanir, eitt nú „Vitlíki við skili“ á undirvísingarøkinum.

Ein felags leistur skal gera lýsingarnar av tørvinum meira samanberiligar. Hvør ætlan skal lýsa:

- **Endamál og raðfestingar**: uppgávur, avbjóðingar, málbólkar og fyrstu nýtsluøki.
- **Fakliga ábyrgd og mørk**: góðkenning, eftirkanning og avgerðir, sum krevja menniskjaliga meting og nærveru.
- **Fortreytir**: dátur, heimildir, mál, førleikar, undirstøðukervi og kunning til ávirkaðar bólkar.
- **Verkseting**: ábyrgd, arbeiðsorka, fígging, royndir og mát fyri góðsku og gagn og avgerðir um framhald, tillaging ella steðg.

Arbeiðið verður knýtt at leiðreglum (átak 2), lógararbeiði (átak 3), etikki (átak 8), førleikamenning (átak 7) og felags tøkniligum og málsligum átøkum. Royndir undir Útbreiðslu í tí almenna (átak 13) og geiraætlanirnar skulu geva hvør øðrum vitan um tørv á felags loysnum.

Ábyrgd og samstarv

Viðkomandi stjórnarráð hava ábyrgd á sínum málsøkjum, og kommunurnar á egnum tænastuøkjum. Fakmyndugleikar, stovnar og kommunur verkseta, eitt nú Undirvísingarstýrið, Sjúkrahúsverkið, Almannaverkið og eldrasamstørvini.

Samstarvspartar eru Fróðskaparsetur Føroya, útbúgvingarstovnar, fakligar eindir, starvsfólk, arbeiðsmarknaðarpartar, brúkarar og tøkni-, dátuverndar- og trygdarpartar. Ognarrættur og luttøka verða staðfest fyri hvørja ætlan; faklig ábyrgd verður verandi á økinum.

> *„Heildarætlanin skal helst endurspegla øll fakøki, annars kunnu summi detta niðurímillum.“*
>
> Luttakari á verkstovu um etiskt og ábyrgdarfult vitlíki
> Kelda: Verkstova um etiskt og ábyrgdarfult vitlíki

Tíð og máting

- **2027**: Eigarar og toymi verða staðfest, tørvur kortlagdur og felags leistur og raðfestingar avtalað.
- **2028**: Ætlanir verða staðfestar og verksettar í stigum. Royndir verða eftirmettar.
- **2029–2030**: Ætlanir verða endurskoðaðar; loysnir við gagni verða breiddar út, tá fortreytir, arbeiðsorka og fígging eru greið.

Mátað verður eftir ætlanum við eigara, fígging og uppfylging og eftir nýtslu í verki. Faklig úrslit, trivnaður, tænastugóðska og brúkararoyndir verða mett saman við trygd, rættindum og føroyskum máli. Málvirði verða sett fyri hvørja ætlan; úrslit lýst árliga.

Fortreytir og váðar

Leiðslustuðul, faklig tíð og fígging til fyrireiking, royndir, læring og rakstur eru neyðug. Ov nógv samtíðis átøk og ógreið rakstrarábyrgd kunnu forða verkseting. Avmarkaðar raðfestingar, brúkaraluttøka og faklig eftirkanning skulu varðveita menniskjaliga meting og nærveru.

Málið_

Føroyskt er okkara móðurmál. Í tí liva okkara søgur, okkara hugsanir og okkara máti at siggja heimin. Málið knýtir okkum saman sum fólk og ber okkara mentan og samleika. At geva føroyskum máli góð lívskor er tí ein felags ábyrgd, sum eisini fevnir um at tryggja málinum pláss í teirri framtíð, vit nú eru við til at skapa.

Átak 11	Styrkja føroyska máltøkni	46
Átak 12	Savna máltilfar	48



Føroyskt skal fylgja við
Ættarlið undan okkum hava varðveitt og ment føroyskt og vunnið tí pláss í skúlum, bókmentum, miðlum og samfelagslívi. Nú stendur ein nýggj uppgáva fyri framman. Nú tá ið vitlíki verður partur av arbeiði, undirvísing og gerandisdegi sum heild, má føroyskt fylgja við. Børn og ung skulu kunna læra, undrast og skapa á móðurmálinum, eisini tá ið tey brúka nýggju tøknina. Vit skulu kunna hoyra okkara egnu rødd og kenna okkara egna samfelag aftur í teimum svarum og frásagnum, sum tøknin miðlar.

Byggja víðari á verandi amboð
Føroyskt hevur longu fingið fótafesti í talgildu verðini. Vit hava orðabøkur, rættstavingarhjálp, teldutalu, talukenning og teldutýðing, og arbeitt verður við føroyskum í málmyndlum. Máltøknidepilin, granskarar, grunnar og fyritøkur hava skapt virðismikið tilfar og amboð, men fakliga umhvørvið er lítið, og arbeiðsorkan er avmarkað í mun til uppgávuna. Tørvur er á varandi førleikum til at menna amboðini, kanna dygdina og tryggja, at úrslitini koma fólki at gagni.

Enskt hevur ein ovurstóran fyrimun í máldátum, íløgum og menningarorku, og vit kunnu ikki rokna við, at føroyskt fer at rigga eins væl til allar uppgávur. Tað avgerandi er, at føroyskt riggar so væl í flestu vanligu nýtslustøðunum, at fólk kunnu velja tað. Er munurin í dygd ov stórur, verður lætt at velja enskt ella danskt av praktiskum ávum. Tí skulu vit arbeiða miðvíst fyri, at føroyskt verður ein góður og veruligur valmøguleiki í arbeiði, útbúgving og gerandisdegi.

Savna máltilfar og virða rættindi
Máldátur eru ein av lyklunum til at røkka hesum. Tað eru tekstirnir, talan og málupplýsingarnar, sum kunnu læra tøknina føroyskt. Dygdin og fjølbroytnið í hesum tilfari hava týdning fyri, hvussu væl amboðini skilja og brúka okkara mál. Tí mugu vit savna og gera føroyskt máltilfar brúkiligt, so bæði okkara skrivaða mál, málføri, fakmál og mentan eru væl umboðað. Við góðum máldátum fáa føroyskir og altjóða mennarar betri grundarlag fyri at menna føroyskt í sínum loysnum, og vit fáa betri møguleikar at eftirmeta, um tøknin veruliga batnar. Hetta gevur okkum eisini størri ræði á framtíðarmenningini av føroyskum í tøknini.

Hetta arbeiðið skal fara fram við virðing fyri upphavsrættinum og teimum, sum hava skapt tilfarið. Greiðar avtalur um loyvi, nýtslutreytir og møguliga samsýning skulu gera tað møguligt at nýta máltilfarið til felags gagn og samstundis virða rættindini hjá høvundum og øðrum rættindahavarum.

Varðveita føroyska ávirkan
Sjálvt um góðskan á føroyska málinum er betrað munandi seinastu tíðina í leiðandi málmyndlunum hjá tøknirisunum, eiga vit framvegis at gera átøk í Føroyum. Um vit ikki gera tað, so kunnu vit í ringasta føri missa ávirkan á, hvønn veg føroyska málið mennir seg.

Tey bæði átøkini í hesum partinum skulu styrkja og byggja víðari á tann grundvøll, sum vit hava á hesum øki. Fyrsta átakið er at styrkja føroyska máltøkni við størri arbeiðsorku og víðkaðum førleikum á Máltøknideplinum og betri samskipan av verandi arbeiði. Næsta átakið er at savna máltilfar og røkja tað til menning og eftirmeting. Saman skulu átøkini geva okkara móðurmáli betri lívskor í vitlíkisøldini, tryggja, at vit hava ræðið á føroyska málinum, og gera tað møguligt hjá okkum at taka lut í tøkniligu menningini á føroyskum.

Átak 11 Styrkja føroyska máltøkni

Endamálið er at styrkja føroyskt sum virkið mál í talgilda samfelagnum. Fólk, stovnar og fyritøkur skulu kunna brúka føroyskt í amboðum til arbeiði, útbúgving og gerandisdag. Við at styrkja Máltøknidepilin fáa vit varandi fakligar førleikar at kanna, hvussu væl amboðini rigga á føroyskum, og hjálpa til, so tey kunnu brúkast í verki.

Hvat verður gjørt

Í samrøðunum við Máltøknidepilin varð víst á tørvin á fleiri fólkum við tíð og førleikum. Á verkstovuni um føroyskt mál varð eftirlýst álítandi føroyskt í amboðunum. Máltøknidepilin fær støðugari arbeiðsorku til at granska, menna og eftirmeta føroyska máltøkni.

Depilin skal gera felags royndarsett og brúka tey til at samanbera, hvussu væl ymisk amboð skilja og brúka føroyskt. Hann skal kanna, um amboðini skriva gott føroyskt, brúka rætt fakorð og skilja føroysk viðurskifti. Bæði sjálvvirkandi royndir og metingar hjá málkønum og fakfólkum skulu vísa, hvar amboðini rigga væl, og hvar tey ikki rigga so væl.

Serligur dentur verður lagdur á royndarverkætlanirnar í heildarætlanini. Depilin skal hjálpa við at seta krøv til føroyskt mál, velja hóskandi amboð og kanna úrslitini saman við starvsfólkum og brúkarum. Fakfólk á viðkomandi øki skulu meta um fakliga innihaldið, meðan depilin hjálpir við at kanna málið og nýtsluna av fakorðum. Hann skal vísa á veikleikar og ráðgeva um, hvussu bøtast kann um teir.

Bygt verður á verandi amboð og verkætlanir hjá tí almenna, grunnum og privatum. Arbeiðið fevnir eisini um talu til tekst, upplestur og aðra máltøkni, raðfest eftir tørvi og tí, sum royndirnar vísa.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Mentamálaráðið. Fróðskaparsetur Føroya við Máltøknideplinum verksetir. Vitlíkiseindin (átak 1) samskipar við heildarætlanina. Samstarvspartar eru verandi verkætlanir og veitarar, brúkarafeløg, málfaklig umhvørvi, rættindahavarar og útlendskir partar. Royndir í almennum arbeiðsgongdum verða avtalaðar saman við átaki 13.

Tíð og máting

Mælt verður til hesi arbeiðsmál, sum skulu staðfestast fakliga og fíggjarliga í 2027:

- **2027**: Arbeiðsorkan verður styrkt. Depilin ger fyrstu royndarsettini, roynir verandi amboð og skrásetir byrjanarstøðuna. Hann byrjar eisini at hjálpa royndarverkætlanunum við at seta krøv til føroyskt mál og kanna úrslitini.
- **2028**: Depilin samanber amboð og fylgir við, hvussu tey rigga í royndarverkætlanunum. Royndir við veruligum brúkarum skulu vísa, um uppgávurnar verða loystar á nøktandi føroyskum og við røttum fakligum innihaldi, og hvat krevur víðari menning.
- **2029–2030**: Depilin endurtekur royndirnar, tá amboðini broytast, og hjálpir við at taka loysnir, sum lúka dygdarkrøvini, í breiðari nýtslu. Úrslit og royndir verða gjørd tøk, so onnur kunnu byggja víðari á tey.

Mátað verður eftir málgóðsku, røttum fakorðum, týðandi feilum og tíðini, sum fer til at eftirkanna og rætta úrslitini. Málfatan, skrivligt mál og fakligt innihald verða mett hvør sær. Samanbering við byrjanarstøðuna og endurtiknar royndir á óheftum tilfari skulu vísa framgongd. Úrslit og óloyst glopp verða lýst árliga.

Fortreytir og váðar

Arbeiðið krevur hóskandi máltilfar, greið loyvi, upplýsingavernd, undirstøðukervi og varandi førleikar. At eitt amboð brúkar gott føroyskt, tryggjar ikki, at innihaldið er rætt. Tí skulu viðkomandi fakfólk taka lut í royndunum og eftirkanna úrslitini. Áðrenn varandi nýtslu skulu eigari, rakstur, dagføring og faklig eftirmeting vera staðfest.

> *„Fólk hava rætt til sítt mál, har sum tey eru í talgilda heiminum.“*
>
> Luttakari á verkstovuni Føroyskt fyrst
> Kelda: Verkstovan Føroyskt fyrst

Átak 12 Savna máltilfar

Endamálið er at savna, skipa og varandi røkja felags føroyskt máltilfeingi til menning og óhefta eftirmeting. Skrivað mál, tala, myndir, video, málupplýsingar og royndartilfar skulu hava skrásettan uppruna, rættindi og nýtslutreytir.

Hvat verður gjørt

Á verkstovuni um føroyskt mál varð víst á tørvin á skipaðari innsavning og góðum føroyskum tilfari. Eftir verkstovuna hava rættindahavarar lagt dent á avtalur og rímiliga samsýning. Innsavningin skal tí sameina málgóðsku og nýtslumøguleikar við virðing fyri teimum, sum skapa tilfarið.

Bygt verður á verandi máltilfar og uppskot til dátusamstarv. Ein landsfevnandi kelduskrá skal vísa tilfar, eigarar, góðsku og loyvda nýtslu. Keldueigarar varðveita upprunatilfarið og lata avrit ella útvalt tilfar inn eftir avtalu.

Innkomið tilfar verður góðskukannað og viðgjørt í miðsavnaðari skipan við søvnum fyri tekst, málupplýsingar, myndir, video og ljóð. Tekstur verður reinsaður og flokkaður. Ljóð og video verða knýtt at avritum, undirtekstum og metadátum. Talutilfarið skal umboða ymiskar røddir, ymiskan aldur, ymisk málføri, ymisk fakøki og ymisk upptøkuviðurskifti.

Óheft royndartilfar verður hildið sundur frá venjingar- og menningartilfari. Atgongdin fær trý stig: opið tilfar, stýrda atgongd og vart granskingarumhvørvi. Loyvi og møgulig samsýning verða avtalað við rættindahavarar.

Tilfar, sum kann deilast, verður útgivið í lýstum sniðum til føroyskar mennarar og stórar altjóða tøkniveitarar. Eingin veitari fær serstøðu ella einkarætt.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Mentamálaráðið.

Fróðskaparsetur Føroya við Máltøknideplinum verksetir, og Vitlíkiseindin (átak 1) samskipar saman við deplinum. Samstarvspartar eru keldueigarar, savnsstovnar, Kringvarp Føroya (KVF), Málráðið, miðlar, forløg, rættindahavarar, kt- og trygdarpartar, granskarar og føroyskir og altjóða tøkniveitarar.

Tíð og máting

- **2027**: Heimild og ábyrgd verða staðfestar. Móttøka, goymsla og útgáva verða skipaðar, og fyrstu útgávustýrdu søvnini gjørd tøk við greiðum loyvum. Samstarv við KVF byrjar.
- **2028**: Innsavning verður víðkað til fleiri keldur, søvn útbygd og óheft royndarsøvn ment. Tilfar at deila verður boðið føroyskum og altjóða mennarum.
- **2029–2030**: Innsavning og røkt verða varandi arbeiði við regluligari dagføring og eftirmeting. Royndarsøvn verða givin út, har loyvi er til tað.

Fyribils arbeiðsmál fyri 2027–2028 eru umleið 500 milliónir góðskutryggjað føroysk orð uttan dupultteljing og minst 10.000 tímar av flokkaðum, tøkniliga brúkiligum talutilfari við greiðum loyvum. Talu- og videotímar verða skrásettir hvør sær.

Mátað verður eftir mongd, dygd, umboðan, metadátum, loyvdari nýtslu, innlatingum og tíð til útgávu.

Fortreytir og váðar

Varandi arbeiðsorka, trygg goymsla og málførleikar, dátutøkniligir førleikar, løgfrøðiligir førleikar og trygdarførleikar eru neyðug. Avtaluleisturin skal eftirmetast við rættindapørtum. Innsavningin er komin afturúr altjóða tænastumenningini; uttan føroyskt stýrt grundarlag kunnu ávirkan og valfrælsi minka. Tørvur og fígging eru óviss, og kortleggingin kann broyta fyribils málini.

> *„Eitt vitlíki, sum dugir føroyskt, má kenna málið, sum vanlig fólk brúka tað – og ikki bara skrivaða málið frá bókmentum og bløðum.“*
>
> Granskari
> Kelda: Kringvarp Føroya um innsavning av máltilfari

Búskapurin_

Búskapurin er grundarlagið undir arbeiði, inntøkum og felags vælferð í Føroyum. Vit skulu bæði styrkja tað, sum longu skapar virði, og geva rúm fyri nýggjum vinnum, arbeiðsháttum og útflutningsmøguleikum. Vitlíki kann hjálpa okkum at menna vinnuna og veita góðar almennar tænastur. Hetta hevur serligan týdning, nú fólkasamansetingin broytist.

Átak 13	Útbreiðsla í tí almenna	54
Átak 14	Vitlíkin vinna	56



Meira fæst burtur úr arbeiðinum
Talið av eldri fer at vaksa meira enn talið av fólki í arbeiðsførum aldri, og vit verða lutfalsliga færri at lyfta uppgávurnar. Størri framleidni merkir, at meira fæst burtur úr arbeiðstíðini og tilfeinginum. Við vitlíki kunnu vit eisini fara undir uppgávur, sum áður vóru ov tíðarkrevjandi ella kostnaðarmiklar. Hvussu stórur búskaparligi ágóðin verður, og nær hann kemur, er tó framvegis óvist.

Styrkja vinnu og almennar tænastur
Í vinnuni kann vitlíki betra framleiðslugongdir og geva grundarlag fyri nýggjum vørum og tænastum. Tá fyritøkur kunnu framleiða meira ella betri við somu arbeiðsorku, kann tað styrkja kappingarførið og geva størri inntøkur, lægri prísir ella hægri lønir. Kapping og eftirspurningur hava týdning fyri, hvussu ágóðin verður býttur millum fyritøkur, starvsfólk og kundar.

Í tí almenna kann vitlíki gera tað møguligt at veita fleiri ella betri tænastur við somu arbeiðsorku. Tøknin kann lætta um umsiting og geva fakfólkum meira tíð til fakliga viðgerð og samband við borgarar og fyritøkur. Styttri bíðitíð og betri tænastur hava virði, eisini tá almennu útreiðslurnar ikki lækka.

Skilja millum tænastur og sparingar
Størri framleidni í vinnuni bøtir tó ikki sjálvvirkandi um fíggjarpolitiska haldførið. Hægri lønir kunnu økja skatta-inntøkurnar, men almennu lønirnar fylgja sum frá líður lønargongdini í vinnuni, og útreiðslurnar kunnu tí vaksa samsvarandi. Hvussu økt framleidni í tí almenna verður gagnnýtt til fleiri ella betri tænastur ella til sparingar, er ein politiskur spurningur. Tí er neyðugt at skilja millum størri tænastuorku og fíggjarligar sparingar.

Skapa varandi virði
Ágóðin krevur íløgur, førleikamenning og tillaging av arbeiðsgongdum. Leiðslur og starvsfólk mugu samstarva um broytingarnar, og fólk skulu hava møguleika at læra og taka nýggjar uppgávur á seg. Royndir skulu vísa, um loysnirnar skapa ein samlaðan vinning, tá kostnaður til menning, innleiðing, eftirkanning og rakstur er taldur við. Tað er eisini neyðugt at fylgja við, hvør fær gagn av broytingunum, og hvør ber kostnaðin.

Tey bæði átøkini í hesum parti skulu hjálpa vinnuni og tí almenna frá áhuga til roynda nýtslu og varandi virði. Útbreiðsla í tí almenna skal royna og eftirmeta loysnir í almennum arbeiðsgongdum. Vitlíkin vinna skal hjálpa fyritøkum at velja hóskandi stig við vitlíki. Saman við felags grundvøllinum og førleikamenningini skulu átøkini styrkja føroyska virðisskapan og tænastur.



Átak 13 Útbreiðsla í tí almenna

Endamálið er at skapa størri virði í almennum tænastum og nýta tilfeingið betur. Stovnar og kommunur skulu fáa hjálp at brúka vitlíki í arbeiðsgongdum og lætta um arbeiðsbyrðuna.

> *„[...] vit mangla enn heitar hendur. Vit vóna, at vitlíki kann hjálpa við teimum køldu hondunum, so meira tíð er til tær heitu hendurnar.“*
>
> Leiðari á kommunala eldraøkinum
> Kelda: Verkstova um munadyggan almennan geira

Hvat verður gjørt

Stovnar fáa stuðul at finna tørv, royna loysnir og máta úrslit. Fimm øki eru útvald grundað á afturboðanir á verkstovunum og eftirfylgjandi samskifti við stovnar:

- Vaktarplanlegging til vaktir, avboð og broytingar.
- Vegleiðari á Vanganum, sum hjálpir borgarum at finna og nýta tænastur.
- Stuðul til málsviðgerð, skipan av upplýsingum og fyrireiking til fakliga meting.
- Tala til tekst í málsviðgerð, fundarfrágreiðingum og hjálp til fólk við skerdum førleika.
- Neyvstilling av málmyndli til føroyskt og eitt fakøki við hýsing í Føroyum, knýtt at føroysku máltøknini (átak 11).

Hvør roynd fær avmarkað vav, eigara, arbeiðsorku, mátitøl og avgerð um framhald. Luttøka og fígging verða avtalaðar við partarnar. Royndir skulu vísa nyttu og møguleikar fyri breiðari nýtslu, men eisini geva grundarlag fyri tillaging ella steðgi.

Uppskalering verður fyrireikað sum serstøk verkætlan við egnum vavi, ábyrgd, arbeiðsorku og fígging til varandi rakstur og breiða nýtslu. Innleiðing verður knýtt at ráðgeving frá Vitlíkiseindini (átak 1), leiðreglum (átak 2), førleikamenning (átak 7) og undirstøðukervi (átak 5). Amboð og dátuatgongd verða skipað við stovninum, dátueigarum og rakstrarpørtum.

Ábyrgd og samstarv

Ábyrgdarhavandi stjórnarráð er Fíggjarmálaráðið.

Stovnar og kommunur verkseta við hjálp frá Vitlíkiseindini (átak 1) og úrvalsliðnum. Vitlíkiseindin (átak 1) samskipar við felags átøk.

Stovnurin ella kommunan eigur tænastuna, arbeiðsgongdina og fakligu avgerðirnar og staðfestir rakstrarábyrgd. Dátueigarar, kt-rakstrarpartar, máltøknifakfólk, starvsfólk og brúkarar verða tikin við í innleiðing og eftirmeting. Arbeiðsbýtið er fyribils.

Tíð og máting

- **2027–2028**: Fimm royndarverkætlanir verða framdar og eftirmettar eftir nyttu, kostnaði og fortreytum fyri breiðari nýtslu. Avgerð verður tikin um uppskalering, tillaging ella steðg.
- **2028–2030**: Uppskalering kann byrja í 2028, um royndirnar í 2027 vísa góð úrslit og stórar nyttumøguleikar. Raðfesting, arbeiðsorka og fígging avgera vavið.

Mátað verður eftir tíðarnýtslu, tænastugóðsku, bíðitíð, arbeiðsbyrðu, brúkarauppliving og samlaðum kostnaði. Eftirkanning og rættingar telja við. Fylgt verður við varandi nýtslu og endurnýtslu. Málviðri verða sett fyri hvørja roynd við støði í støðuni undan innleiðing. Árlig frágreiðing vísir úrslit og framhaldsavgerðir. Verandi arbeiði kann halda fram eftir egnum fortreytum og verður knýtt at átakinum.

Fortreytir og váðar

Fígging skal fevna um fakliga tíð, menning, tillaging, førleikar og rakstur. Viðurskifti viðvíkjandi dátuatgongd, heimildum, trygd og føroyskum máli verða avgreidd. Vantandi arbeiðsorka og ógreið ábyrgd kunnu forða varandi nýtslu. Framhald krevur staðfesta ábyrgd og fígging, áðrenn útbreiðsla verður góðkend.

Átak 14
Vitlíkin vinna

Endamálið er at styrkja framleidni, nýskapan og kappingarføri í føroyskum fyritøkum. Leiðslur og starvsfólk skulu fáa grundarlag fyri at meta um møguleikar, førleikar, kostnað og váðar og velja eitt hóskandi fyrsta stig við vitlíki.

> *„Tey flestu eru komin nógv styttri við vitlíki enn tey geva seg út fyri. Veruliga bragdið er ikki at tosa um stórar framtíðarætlanir, men at hjálpa fyritøkunum í gongd við ítøkiligar verkætlanir, sum skapa vøkstur.“*
>
> Leiðari úr altjóða vitlíkisumhvørvinum
> Kelda: Fundarnótur frá altjóða samrøðu

Hvat verður gjørt

Á vinnuverkstovuni kom fram, at fyritøkur vóru á ymiskum stigum: summar nýttu vitlíki í kjarnuarbeiðinum, meðan aðrar royndu seg fram. Sóknast varð eftir deiling av veruligum royndum. Tilgongdin skal hjálpa fyritøkum við ymiskum fortreytum at velja eitt hóskandi næsta stig.

Saman við Vinnuhúsinum verður ein tilgongd fyrireikað við stuttum leiðslufundum, verkstovum, vinnudømum og einfaldari kortlegging av tørvinum í fyritøkuni. Fyribils er málið 30–40 fyritøkur; endaligt tal, málbólkur og luttøkutreytir verða lagað eftir arbeiðsorku og fígging. Bæði smáar og størri fyritøkur skulu kunna taka lut.

Hvør fyritøka lýsir verandi nýtslu og tørv og fær hjálp at velja eina uppgávu og meta um gagn, kostnað, dátur og førleikar. Fyrsta úrslitið er eitt avgerðargrundarlag og val av næsta stigi. Síðan kann fyritøkan fara undir avmarkaða roynd við eigara, arbeiðsorku og máting, sum vísir grundarlagið fyri menning, útbreiðslu, broyting ella steðgi.

Fyritøkurnar eiga verkætlanirnar og velja sjálvar ráðgevar. Leikluturin hjá Vitlíkiseindini (átak 1) skal avmarkast greitt og virða kappingina. Vitlíkisskúlin (átak 7) stuðlar førleikamenning og vitanardeiling. Feløg innan vinnugreinar kunnu savna líknandi tørv, og Altjóða samstarv (átak 4), eitt nú royndir frá AI Finland, kann geva íblástur. Vinnuligur trúnaður og rættindi skulu virðast.

Ábyrgd og samstarv

Vinnumálaráðið hevur saman við Fíggjarmálaráðnum ábyrgd av felags átøkum; endaligt býti skal staðfestast. Mælt verður til, at Vinnuhúsið samskipar luttøkuna. Vitlíkiseindin (átak 1) samskipar við heildarætlanina, og Vitlíkisskúlin (átak 7) við læringina. Fyritøkurnar verkseta sjálvar.

Samstarvspartar eru KT-felagið, vinnugreinafeløg, fyritøkur, starvsfólk, ráðgevar og veitarar og møguliga Vinnuframi og altjóða partar. Vinnuhúsið tekur undir við kósini og luttøku, men manning, faklig veiting og fígging eru óavgreiddar. Leiðslurnar skulu raðfesta tíð og taka starvsfólk við.

Tíð og máting

- **2027**: Arbeiðsbýti, manning, fígging og treytir verða avgreidd. Leisturin verður royndur í avmarkaðum umfari við fundum, kortlegging og vali av fyrstu royndum.
- **2028**: Tilgongdin verður lagað og víðkað eftir royndum og tilfeingi. Fyritøkur fylgja upp og deila úrslit.
- **2029–2030**: Framhald og breiðari luttøka verða mett eftir staðfestum gagni og varandi nýtslu.

Mátað verður eftir luttøku, avgerðargrundarlagi, royndum og varandi loysnum. Tíð, góðska, framleidni, inntøka og kundavirði verða mett móti menningar-, innleiðingar- og rakstrarkostnaði. Skeiðsluttøka einsamøll er ikki nokk. Málvirði verða avtalað eftir kortlegging, og úrslit og forðingar lýst árliga.

Fortreytir og váðar

Felags fígging skal skiljast frá íløgum hjá fyritøkunum. Fígging úr Vinnuframa og møguligt luttøkugjald kunnu kannast; treytir skulu vera greiðar undan luttøku. Tíðartrot, vantandi førleikar og kostnaður kunnu tarna serliga smærri fyritøkum. Greitt arbeiðsbýti, javnar veitaratreytir, uppfylging, dátuvernd og trygd skulu fyribyrgja ógreiðum markamótum og virksemi uttan veruliga nýtslu.

Fíggjarligt yvirlit og viðmerkingar

Upphæddir í 1.000 kr. í føstum 2027-prísum.

Nr.	Átak	2027	2028	2029	2030	Tilsamans
Nýggj játtan til heildarætlan_						
1	Vitlíkiseind	1.800	5.000	5.000	5.000	16.800
2.	Vitlíkisleiðreglur	0	0	0	0	0
3.	Lógarverkið	0	0	0	0	0
4.	Altjóða samstarv	200	500	500	500	1.700
5.	Tøkniligt undirstøðukervi	1.000	3.500	3.500	3.500	11.500
6.	Dátugrundarlagið	0	1.000	1.000	1.000	3.000
7.	Vitlíkisskúlin	500	0	0	0	500
13.	Útbreiðsla í tí almenna	1.500	2.500	1.000	1.000	6.000
	Tilsamans til nýggja játtan	**5.000**	**12.500**	**11.000**	**11.000**	**39.500**
Onnur fígging_						
8	Etikkur og rættindi	50	50	50	50	200
9.	Arbeiðsmarknaðarráð fyri vitlíki	350	700	700	700	2.450
10.	Geiraætlanir	—	—	—	—	—
11.	Styrkja føroyska máltøkni	900	2.700	2.700	2.700	9.000
12.	Savna máltilfar	0	0	0	0	0
14	Vitlíkin vinna	—	—	—	—	—
	Tilsamans til aðra fígging	**1.300**	**3.450**	**3.450**	**3.450**	**11.650**
	Tilsamans, nýggj játtan + onnur fígging	**6.300**	**15.950**	**14.450**	**14.450**	**51.150**

1) Vitlíkiseind
Tvey ársverk í 2027 og fimm frá 2028. Felags samskipan, skrivstovuhald og ráðgeving eru innroknað. Beinleiðis altjóða samstarv og keypt rokniorka standa á serstøkum reglum.

2) Leiðreglur
Kostnaðurin er íroknaður í starvsfólkaútreiðslunum til Vitlíkiseindina.

3) Lógarverkið
Kostnaðurin er íroknaður í starvsfólkaútreiðslunum til Vitlíkiseindina.
Árligi kostnaðurin fyri at fáa rættindi til innsavning og granskingarnýtslu av máltilfari er óvissur og kemur at liggja í átakinum at savna máltilfar.

4) Altjóða samstarv
Kostnaðurin er til at luttaka í samstarvi og at keypa atgongd til talgilt undirstøðukervi.

5) Tøkniligt undirstøðukervi
Talan er um partvísa íløgu til at seta ferð á. Almennir stovnar við tørvi á rokniorku rinda sín part, tá teirra tørvur er.
Fortreytin er, at undirstøðukervið verður veitt sum hýsingartænasta, ið verður útbygd á teimum ymsu økjunum, so hvørt sum nýtslan veksur.
Játtanin fevnir ikki um alla vitlíkisnýtslu hjá tí almenna.
Verður tørvur á nógvari rokniorku, sum krevur íløgu, krevur tað eina serstaka íløgu og fígging, sum ikki eru fevnd av hesum karmi.

6) Dátugrundarlag
Fyribils 1 mió. kr. árliga í 2028–2030. Uppgávur, ábyrgd og kostnaðarbýti skulu lýsast nærri, eisini markið móti tøkniliga undirstøðukervinum og máltilfarinum.

7) Vitlíkisskúlin
500 tkr. verða settar av fyri at seta ferð á Vitlíkisskúlan í 2027. Hereftir skal Vitlíkisskúlin vera sjálvfíggjandi við brúkaragjøldum.

8) Etikkur og rættindi
Játtanin hoyrir til Heilsu- og Orkumálaráðið og er tí ikki við í upphæddini til nýggja játtan.

9) Arbeiðsmarknaðarráð
Játtanin hoyrir til Vinnumálaráðið og er tí ikki við í upphæddini til nýggja játtan.

10) Geiraætlanir

Fíggingartørvur óavkláraður. Verður fíggjað av geirunum.

---

11) Styrkja máltøkni

Játtanin er ætlað at styrkja teir førleikar, sum vórðu eftirlýstir innan økið máltøkni. Her er talan um: fólk til at savna føroyskt máltilfar og fáa rættindaavtalur í lag, dátuserfrøðingar til at reinsa, skipa og góðskutryggja tilfarið og vitlíkis- og máltøknisserfrøðingar til at menna, tillaga og eftirmeta málmyndlar og amboð.

Arbeiðið krevur eisini føroyska málfrøðiliga serfrøði til merking og málsliga góðskutrygging. Førleikarnir kunnu fáast til vega við setanum, samstarvi við granskingarumhvørvi og lesandi ella keypi av serfrøði. Endaliga samansetingin og býtið millum máltøkni og arbeiðið við máltilfari verða ásett í verksetingini.

Játtanin hoyrir til Fróðskaparsetur Føroya og er tí ikki við í upphæddini til nýggja játtan.

12) Savna máltilfar

Kostnaðurin fyri at savna máltilfar (átak 12) er íroknaður í átaki 11, styrkja máltøkni.

---

13) Útbreiðsla í tí almenna

Mest verður sett av fyrstu árini, tá tørvurin á lærdómi, royndarverkætlanum og eftirmeting er størstur. Seinnu árini verður rúm fyri at royna nýggjastu tøknina og kanna nýggjar nýtslumøguleikar.

Játtanin til útbreiðslu fevnir um avmarkaðar royndir, lærdóm og fyrireiking. Størri menningar- og verksetingarverkætlanir, breið útbreiðsla av loysnum og varandi rakstur eru ikki fíggjað í hesum karmi. Tey krevja sjálvstøðuga kostnaðarmeting, avgerð og serstaka fígging hjá viðkomandi myndugleikum.

---

14) Vitlíkin vinna

Fíggingartørvur óavkláraður. Verður fíggjað av vinnuni.

Les meira um vitlíki og heildarætlanina á

vitliki.fo

Gjaldstovan

www.sansir.fo

Gjaldstovan
Kvíggjartún 1
FO-160 Argir

Tel.: +298 35 24 00
gjaldstovan@gjaldstovan.fo
www.gjaldstovan.fo